# FINGU FLOGSKIP HARRABOÐ UM A

**FLOGVANLUKKA** Russiska loftferðslueftirlitið mælti flogskiparunum í polska forsetaflogfarinum frá at seta flogfarið á flogvøllin í Smolensk, tí tað vóru ikki líkindi at lenda. Kortini royndu teir at seta flogfarið har - til fánýtis

Árni Joensen

Tað var tjúkt í mjørka yvir flogvøllinum í Smolensk, tá flogskipararnir umborð á polska forsetaflogfarinum gjørdu klárt at lenda. Alt í einum bar annar vongurin við nøkur trø hálvan annan kilometur frá lendingarbreytini. Eygnavitni greiddu frá, at eldur kom í flogfarið beinanvegin, og at tað var sum ein eldkúla.

Men hvat hendi umborð á flogfarinum løtuna áðrenn vanlukkuna? Polsku myndugleikarnir søgdu í gjár, at flogfarið var í lagi tekniskt, og russisku myndugleikarnir søgdu longu beint eftir vanlukkuna, at hon stóðst av mánnaávum.

– Eftirlitið ráddi flogskiparanum til at fara til Minsk ella Moskva, men kortini gjørdi hann av at lenda í Smolensk. Tað var eitt mistak, tí einki flogfar átti at lenda har í sovorðnum líkindum, segði Aleksandr Aljosjin hjá russiska loftferðslueftirlitinum í gjár. Hann segði, at eftirlitsmenninir høvdu fleiri ferðir biðið polska flogfarið fara uppaftur og halda fram til Minsk ella Moskva, men til fánýtis.

### Harraboð?

Longu beint aftan á vanlukkuna kunngjørdi russiski forsetin, Dmitri Medvedev, at hann hevði sett eina serliga nevnd við Vladimir Putin, forsætisráðharra á odda at kanna, hví vanlukkan hendi.

Russiski kreppumálaráðharrin, Sergej Sjoigu, segði í gjár, at bjargingarliðini høvdu funnið teir báðar svørtu kassarnar hjá polska flogfarinum. Í teimum er alt samskiftið hjá flogfarinum og ferðskrivarin.

Summir eygleiðarar hava reist spurningin, um tað kann hugsast, at flogskipararnir á forsetaflogfarinum fingu harraboð um at lenda í Smolensk, hóast russiska eftirlitið hevði mælt frá. Eygleiðararnir vísa á, at Lech Kaczynski hevði tað fyri at taka mál í egnar hendur við at vísa á, at tað var hann, sum var forseti, og teir halda tað ikki vera óhugsandi, at flogskipararnir fingu boð um at lenda, hóast eftirlitið hevði mælt frá.

Polskir fjølmiðlar siga, at undir krígnum millum Russland og Georgia um summarið í 2008 gjørdi Lech Kaczynski av at fara við flogfari til georgiska høvuðsstaðin Tblisi. Á vegnum hagar fingu flogskipararnir á forsetaflogfarinum at vita, at tað var ov hættisligt at lenda í Tblisi orsakað av krígsstøðuni. Men forsetin kravdi, at flogskipararnir skuldu halda fram og lenda í Tblisi. Teir mótmæltu, men noyddust at gera eftir boðunum, og flogfarið setti seg í georgiska høvuðsstaðnum. Aftaná ljóðaði, at flogskipararnir høvdu fingið eina átalu fyri at seta seg upp ímóti boðum forsetans.

### Svørtu kassarnir

Enn veit eingin, um flogskipararnir fingu somu boð leygarmorgunin. Fingu flogskipararnir harraboð frá forsetanum um at lenda í Smolensk, er spurningurin, um tað kann hoyrast á upptøkunum í svarta kassanum. Ein annar spurningur er so, um alt innihaldið í kassunum verður almannakunngjørt, siga eygleiðararnir. Teir báðir svørtu kassarnir eru fluttir til Moskva, har russiskir og polskir serfrøðingar skulu kanna innihaldið.

William Voss, sum er leiðari á altjóða trygdarstovninum fyri flogferðslu, sigur við tíðindastovuna AP, at framferðin hjá teimum

# LECH KACZYNSKI

## – ein umstríddur forseti

**FLOGVANLUKKA** Við flogvanlukkuni uttan fyri russiska býin Smolensk leygarmorgunin endaði ein long oog mangan umstrídd politisk lívsleið, og tað fær uttan iva ávirkan á tað politiska landslagið í Póllandi



## Lech Kaczynski

- Lech Kaczynski og tvillingbroren Jaroslaw vórðu bornir í heim tann 18. juni í 1949.
- Brøðurnir stýðjaðu fakfelagsleiðaran Lech Walesa, og teir høvdu eisini ein týðandi leiklut, tá Walesa varð valdur til forseta í 1990.
- Lech Kaczynski var løgmálaráðharri í stjórnini hjá Jerzy Buzek, sum bleiv forsætisráðharri í 1997.
- Lech Kaczynski varð valdur til forseta í 2005, og árið eftir varð bróðurin Jaroslaw valdur til forsætisráðharra. Hesa tíðina bleiv Pólland ofta umrøtt sum "tvíburðarlýðveldið", til Jaroslaw fór frá í 2007.
- Lech Kaczynski var kendur sum ein konservativur katolikkur, og hann og bróðurin vórðu ofta lagdir undir at eggja til høgrapopulistiska tjóðskaparkenslu.
- Sum forseti var Kaczynski ímóti liberalistiskum búskaparpolitikki, og tað vísti hann við at nýta sýtingarrætt forsetans ímóti fleiri lógaruppskotum hjá Donald Tusk, forsætisráðharra og stjórn hansara.

Árni Joensen

Hóast alt bendi á, at Lech Kaczynski fór at missa forsetaembætið á næsta vali, eins og tvíburðarbróðurin Jaroslaw misti forsætisráðharrasessin seinast, fær brádligi deyði hansara ivaleyst bæði stórar og varandi avleiðingar fyri tað politiska landslagið í Póllandi.

Tann konservativi, tjóðskaparsinnaði og trúgvandi Lech Kaczynski gjørdist kendur sum borgarstjóri í høvuðsstaðnum Warszawa, har hann alt fyri eitt royndi at gera upp við tær liberalu